# Landssjúkrahúsið søkir eftir HR-leiðara

## Er førleikamenning, leiðslumenning, strukturur og tilgongdir tín sterka síða?

**HR funktiónin:**
Sum HR-menningarleiðari verður tú ein serstakliga týdningarmikil partur av tí nýggju deildini, sum tænir uml. 850 starvsfólkum.
HR funktiónin verður ein stabseind og skal hava beinleiðis tilvísing til sjúkrahúsleiðsluna. Væntandi fær funktiónin 3-5 starvsfólk at taka sær av uppgávum innan HR og menning av/á stovninum.

**Týdningarmiklastu uppgávur hjá HR-menningarleiðaranum tey fyrstu 2 árini verða:**

1. At luttaka í verksetan av fokusøki 2010/11 „Menning og útbúgving“
2. At íverkseta strukturin hjá HR-funktiónini yvir uppgávur, uppgávubýti millum onnur starvsfólk, íverkseta frymil fyri samstarvi við depils- og deildarleiðarar, kunningarfrymil í mun til sjúkrahúsleiðslu/Heilsumálaráðið/leiðslubólkin
3. At gera førleikamenningarstrategiir og ætlanir fyri starvsfólkabólkar og einstøk starvsfólk, m.a. við menningarsamrøðum og nøgdsemiskanningum
4. At halda í træðrunum og vera sparringspartnari i starvsfólkamálum fyri sjúkrahúsleiðslu og leiðslutoymir, møguliga í samstarvi við Heilsumálaráðið og uttanhýsis ráðgeving

**Umsøkjaraprofilur:**

- At tú hevur eina viðkomandi víðari útbúgving og leiðsluroyndir, gjarna frá HR ella líknandi øki.
- At tú hevur kunnleika til starvsfólkaløgfrøði og royndir við nýtsluni av løggávuni
- At tú hevur í minsta lagi 2 ára HR-royndir frá einum størri stovni ella virki
- At tú hevur leiðsluroyndir ella dokumenteraðar projektroyndir
- At tú kann skjalprógva tilgongdir, kunnleika og royndir
- At tú er opin, loyal/ur og treyst/ur til at tola at arbeiða undir trýsti
- At tú í stóran mun kann skjalprógva samstarvsvilja, er dugnalig/ur íverksetari og at tú fyrr hevur verið við til at bygt eina nýggja deild ella funktión upp



Gransking & menning

Trivnaður

Sjúklingurin í miðdeplinum

Starv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

Sosialurin 341800

## Fakta um Landssjúkrahúsið

Við 850 starvsfólkum við umleið 30 yrkisbólkum er Landssjúkrahúsið størsta einstaka arbeiðspláss í Føroyum

29 læknaligar sergreinar (herav 9 konsulentskipanir)

180 sengur, herav 55 sengur á psykiatriska deplinum

9.000 innleggingar um árið

30-35.000 ambulantar vitjanir um árið

400.000 analysur i kliniskari kemi um árið

18.000 røntgenkanningar um árið

**Vit bjóða:**

- Eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum tú sjálv/ur er við til at skapa
- Ein ágrýtnan leiðara- og starvsfelagabólk á høgum fakligum støði
- Eitt gott samstarvslag við góðum íblástri
- Eitt sjúkrahús við einum aktivum starvsfólkapolitikki og einari strategiætlan, sum m.a. raðfestir leiðslu- og starvsfólkamenning høgt
- Eitt sjúkrahús við nógvum ymiskum starvsbólkum og harvið nógvum sáttmálum

**Lønar- og setanartreytir:**
Eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

**Nærri upplýsingar um starvið eru at fáa við at venda sær til:**
Bente Wennerberg, menningarstjóra,
tlf. +298 304 500, lokal 1007, t-postur bw@ls.fo

Starvsprofilur og nærri upplýsingar um sjúkrahúsið eru at fáa á okkara heimasíðu www.ls.fo

**Umsókn við CV skal sendast til:**
Landssjúkrahúsið
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:**
Umsóknarfreistin er tann 15. nov. 2010 kl. 12.00
Setanarsamrøður verða væntandi tann 19. november, har frumrit av prógv v.m. skulu verða við

Vit eru vorðin grønari

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ · J.C. SVABOS GØTA
100 TÓRSHAVN · TEL. 304500 · FAX 314253
LS@LS.FO · WWW.LS.FO